# Bygdin

Flytimenninir vóru longu á veg. Eg sat við vindeygað og stardi út í regnið. Tað oysti niður. Teir fóru at koma um eina løtu, og so var alt hetta liðugt. Babba og “mamma” skuldu flyta til onkra bygd í sambandi við arbeiðið hjá babba, uttan at hugsa um nakran annan enn seg sjálvi. Høvdu tey kanska spurt meg um mína meining? Halda tey kanska, at eg vil flyta fleiri hundrað kilometrar burtur frá bæði vinum og familju bara fyri eitt býtt arbeiði? Tey taka meg í næstu rekkju, og soleiðis hevur tað altíð verið. Altíð, síðan babba gifti seg við hasari Lenu. Eftir at mamma doyði, hevur alt verið so... “Markus?” babba rópti. “Markus, vit fara nú!” Eg tók kuffertið, fór oman gjøgnum gomlu trappurnar og út í bilin. Eg sat í bilinum og hugdi eina síðstu ferð eftir teimum gomlu húsunum, ímeðan tey spakuliga hvurvu onkustaðni út í myrkrið.

Eg veit ikki, hvussu leingi vit koyrdu, men tað kendist óendaliga leingi. “Eru vit ikki har skjótt?” ”Jú, vit skuldu nokk vera har umleið... nú!” og tað vóru vit mín sann eisini. Hetta var ein lítil bygd. Ikki meir enn eini fimmhundrað fólk mundu búgva her. Húsini sóu eisini elligomul út, og mundu nokk vera fleiri hundrað ára gomul.

Vit møttu einum manni um miðal aldur, eitt sindur innkomin í bygdina, og spurdu um okkurt gistingarhús var her um leiðir. “Gistingarhús eru eingi, men tit kunnu royna yviri hjá Dánjali. Hann plagar at hava nokk av plássi, og dámar væl at hava onkran at tosa við”. Vit takkaðu fyri og fóru avstað. Húsini hjá Dánjali vóru rættiliga stór, men sóu eisini eitt sindur nýggjari út, enn hini húsini her um leiðir. Eg bankaði upp á, og út kom ein sera stórur og kraftigur maður. Hetta mátti vera Dánjal. Hann var sera blíður og beyð okkum innar.

Inn komin fingu vit heitt kakao og bollar, og hann vísti mær á kamarið, eg skuldi sova í. Vit skuldu bert gista her í kvøld, í morgin skuldu vit fara at finna okkum húsini, vit høvdu fingið lovað. Songin var bæði heit og fjálg, og har gekk bert ein lítil løta, so sovnaði eg.

Morgunin eftir fór eg ein túr út at hyggja meg um. Eg fann út av, at bygdin her ikki var so, sum eg hevði ímyndað mær. Her var bakari, handlar av ymiskum slagi, og so var her eisini ein banki. Tað var helst í hesum bankanum, babba skuldi arbeiða. Hetta var ikki so ringt, sum eg hevði roknað við, men hetta var tó ikki sum har heima. Her var so friðarligt, og eg sá næstan eingi fólk úti her, og tey eg heilsaði upp á, tóktust rættiliga varin. Ja, næstan bangin. Eg hugsaði ikki so nógv um hetta beint nú, men fór heldur at keypa eitt breyð frá bakaranum, sum babba hevði biðið meg um.

Á vegnum yvir aftur til Dánjal møtti eg einum dreingi, sum sá út til at vera umleið á mínum aldri. Hann segði, at hann æt Martin, og var sonur bakaran, Olaf. Eg spurdi hann, hvar øll fólkini vóru, og hví øll virkaðu so stúrin. “Tær síðstu vikurnar er nógv løgið hent í bygdini. Løgnar hendingar eru farnar fram, og fólk eru flutt úr bygdini, og tey hava selt húsini. Løgið, tí at nógv av teimum, sum farin eru, hava búð her í bygdini í nógv Harrans ár, men fara so brádliga, og eingin hevur hoyrt frá teimum síðani. Eg havi hoyrt onkran siga, at tey uppøst høvdu tosað um, at tey høvdu sæð spøkilsir, og her vildu tey ikki búgva longur. Eg veit ikki, um eg trúgvi hesum, men fleiri fólk eru longu flutt úr bygdini...” “Ja, hetta ljóðar løgið, sera løgið. Men nú má eg fara. Vit síggjast!”

Inni hjá Dánjali var nógvur larmur og gangur. Nógv fólk vóru komin, og tey róptu og geylaðu upp í heysin á hvørjum øðrum. Ikki visti eg, hví tey vóru

her, so eg spurdi ein mann, sum eg haldi var Pól, bankastjórin. Hann líktist honum í øllum førum, soleiðis sum babba hevði sagt mær um hann. Lítil, tjúkkur, næstan heilt skallutur, og so mátin hann tosaði. “Veitst tú ikki tað? Nú er eisini Anna flutt, umframt Ragnar, Heðin og Marjun! Og øll tosaðu tey um at hava sæð spøkilsir.” Hann ljóðaði ógvuliga uppøstur, og hann segði hetta bæði hart og skjótt. “Nei, tað visti eg ikki,” segði eg, og fór so at leita eftir babba. Eg hevði ikki sæð hann síðani í morgun. Lena stóð uttanfyri og roykti eina sigarett, men eg ætlaði so ikki at spyrja hana, hvar hann var. Tað var tað síðsta eg fór at gera. Hann var nokk bara farin at hyggja eftir húsunum.

Teir næstu dagarnar, hugsaði eg stórt sæð ikki um annað enn hesar løgnu hendingar fólkini høvdu tosað um. Ein vika gekk, og hvønn dag fluttu fleiri og fleiri fólk úr bygdini. Nú var babba komin væl í gongd við arbeiðinum. Lena sat í køkinum og drakk ein kaffimunn, tá ið eg kom upp tann eina morgunin. Tað virkaði, sum um hon lætst ikki at síggja meg, men tað var eisini bara gott. Eg hevði mest sum ongan hug at tosa við nakran beint nú. Eg setti meg at lesa eitt blað, men tað var heilt ógjørligt at lesa. Sjálvt um eg las tann sama setningin ígjøgnum tíggju ferðir, so fataði eg ikki, hvat stóð har. Har var ov nógv at hugsa um. Tankarnir mólu í høvdinum á mær. Eitt var so heilt sikkurt, og tað var, at eingi spøkilsir vóru til! Her var okkurt, sum ikki ruggaði rætt. Eg legði blaðið til viks og fór yvir í bankan. Í bankanum søgdu tey, at babba var júst farin eitt ørindi, og eg kundi bara seta meg á skriv-stovuna hjá honum at bíða. Tað var gingin ein góð løta, og babba var enn ikki komin. Eg keddi meg og sat bara og stardi út í leysa luft. Eyguni festu seg á nøkur pappír, sum lógu á skriviborðinum, og uttan at hugsa um tað, las eg tað, ið har stóð. Hetta var ein listi yvir húsakeyp og -sølu í bygdini. Eg hugdi hann ígjøgnum, og har stóð, at Annusa hús vóru longu seld. Eg gjørdist forvitin, og

fór at lesa nærri, hvat har stóð. Har stóð, at Heðin Krákunev var keyparin. Eisini hjá Roberti. Sama navn gekk aftur og aftur á pappírinum. Heðin Krákunev. Sera løgið. Hví seldu fólk síni hús? Og hví keypti onkur tey aftur næstan beinan vegin? Og enntá sami persónur?

Um kvøldið tá ið vit ótu døgurða, segði eg hetta fyri babba. Hann helt ikki hetta hevði nakað upp á seg, og bað meg lata vera við at lesa skjøl, sum ikki komu mær við. Seinni tað kvøldið kom Lena yvir til mín og segði, at hon eisini helt, at hetta var løgið, og at hon kundi hjálpa mær við at finna út av, hvør hesin Heðin var. Eg var eitt sindur illa við. Eg hevði ikki verið so fittur við Lenu, sum eg átti. Hon var kanska slettis ikki so galin kortini. Lena og eg tosaðu eitt sindur um hetta, og hon visti, hvar Heðin búði. Hús hansara lógu eitt sindur avsíðis, eitt petti uttanfyri bygdina, og vit avgjørdu at fara yvir til hansara í loyndum.

Tá ið vit nærkaðust húsum hansara, hómaðu vit tveir persónar fara avstað. Tann eini var nokk Heðin, men eg visti ikki, hvør hin var. Teir stongdu væl eftir sær og koyrdu avstað í einum svørtum bili. Eg mátti inn her, um eg skuldi loysa gátuna. Tíbetur stóð eitt kjallaravindeyga á gloppi, sum eg kundi sleppa inn í gjøgnum. Eg bað Lenu standa á vakt, og so fór eg inn.

Har var ógvuliga myrkt, og einasta ljósið, sum var, kom ígjøgnum eina hurð til eitt annað rúm, sum stóð á gloppi. Eg fór innar, og har stóð ein lítil lampa, sum lýsti. Á einum borði lógu nakrar arkitektatekningar; har tað stóð: “Útbyggingarætlanir í Steinabotni...” Á pappírunum vóru eisini myndir av bæði motorvegi mitt ígjøgnum bygdina, og stórt byggivirksemi, so sum hotel og tílíkt. Nú var eg farin at síggja eina meining í øllum hesum. Tað einasta, sum eg enn ikki skilti var, hví øll hesi fólkini vóru blivin so bangin...

Ein bilur stegðaði uttanfyri. Brádliga bankaði Lena á rútin og bað meg skunda mær út haðani. Eg rann yvir móti vindeyganum, men bráðsteðgaði, tí onkur tók í kjallarahurðina. Eg fór ikki at náa yvir til vindeygað, áðrenn teir komu inn! Eg var tí noyddur at venda við og leypa inn aftur kontórið. Hetta hjálpti tó lítið, tí eg hoyrdi fólk koma inn á kjallaran, og eg hoyrdi manna-røddir nærkast kontórinum. Eg visti ikki míni livandi ráð! Mítt hjarta bankaði títtari enn nakrantíð áður. Hvat skuldi eg gera? Eg skundaði mær inn í eitt skáp, og í somu løtu komu Heðin og ein annar inn í rúmið. “Tú ert jú borgarstjóri, so tað man ikki vera nakar trupulleiki at fáa hetta góðtikið. Tá ið vit fyrst hava bygt hetta, fara prísirnir á húsunum upp í topp...”
Borgarstjórin? Eg hevði hoyrt nóg mikið. Eg mátti út her frá! Eg var so spentur og bangin, at eg slettis ikki hugsaði um, at eg hevði ilt í beininum av at sita á onkrum hørðum. Eg bleiv rættiliga kløkkur. Tá ið eg hugdi niður, sá eg eitt lýsandi høvd hyggja ónt ímóti mær, smílandi. Eg mundi rópt av ræðslu. Men so sá eg, at tað bert var ein maska. Eg var umgyrdur av øllum møguligum óhugnaligum tingum, har ímillum draktum, maskum og ketum. So hetta var tað, sum fólkini í bygdini vórðu rædd av. “... Men latið okkum nú bara fyrst fáa restina av fólkunum út av verðini.” Hoyrdi eg annan mannin siga, og eg hoyrdi fótafet nærkast mær.
Skápið! Eg var fangaður! Onkur kom gangandi yvir ímóti skápinum og stegðaði beint framman fyri tí. “Eg eri troyttur.” Hoyrdi eg hin mannin siga, “vit gera tað í annaðkvøld”.

Løtu seinni fóru báðir út úr kontórinum.

Eg slapp mær út ígjøgnum vindeygað, og uttanfyri stóð Lena og bíðaði eftir mær. “Hvat hendi?” Spurdi hon. Eg greiddi henni frá tí, sum var hent, og hon skundaði sær at ringja eftir politiinum, sum skjótt var á staðnum.

Yvirskriftirnar í bløðunum komandi dagarnar snúðu seg allar um borgarstjóran í Steinabotni, sum, í sambandi við stórar íløgur frá einum útlendskum milliónningi, hevði stórar ætlanir um at ríka seg sjálvan upp. Higartil var tað bara borgarstjórin, sum visti um ætlanirnar, men tá ið verkætlanin fór at vera almennakunngjørd, fóru húsaprísirnir í Steinabotni at fleirfaldast, og borgarstjórin og hjálparmaður hansara fóru at vinna milliónir.

Eftir hetta var stemningurin í bygdini nógv betri, og tað gjørdist ein ógvuliga hugnalig tíð í Steinabotni. Tey flestu fólkini keyptu húsini aftur, og sjálvandi vóru Lena og eg hetjur í bygdini rúma tíð eftir hetta, og vit blivu bestu vinir.

*Tórur Højgaard Jacobsen*

*Eysturskúlin 8b*

*Tlf. 310203*